Børnini í barnagarðsstovuni 'Látrinum':

# - Vit hava tey fínastu grýluklæðini í Føroyum



*Børnini stóðu spent í langari bíðiröð og fylgdu væl við, hvussu leikur fór fram við tunnuna<None>*

**'Koma tit nú at taka myndir av okkara fínu heimagjørdu grýluklæðum?' 'Vit hava sjálvi hjálpt konunum, ið ansa eftir okkum, at gera tey!' Tá Sosialurin kom á gátt í barnagarðsstovuni 'Látrinum', komu børnini erpin rennandi úr øllum ættum í grýluklæðum í alskyns skøpum og litum**

FØSTULÁVINT
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Í barnagarðsstovuni 'Látrinum' í Býlingshúsinum Millum Gilja hava konurnar - Maiken, Jannie, Pernille og Olivia - arbeitt dúgliga hvønn dag seinastu tríggjar vikurnar við at gera grýluklæði til øll 20 børnini, ið ganga á stovuni. Børnini hava sjálvi valt og hjálpt til at gera búnan, og eru øll nøgd og fegin um hetta arbeiðið:

- Fyrr vóru altíð kettur í tunnunum, og tí eitur tann, ið slær tunnuna niður, kattakongur. Men kettur eru ongantíð longur í tunnunum, tískil havi eg valt at vera ein ketta á fastalávint í dag. Eg havi eisini hjálpt konunum at gera kettuklæðini - m.a. stappað ull í halan og oyruni, sigur ein kát genta, meðan hon erpin vísir okkum síni grýluklæðir.

### Vildu vera øðrvísi

Hugskotið til at fara í holt við at gera heimagjørdu grýluklæðini kom av fyrstan tíð fullkomiliga av tilvild, men allar konurnar á stovuni tóku alt fyri eitt undir við hugsanini:

- Vit sótu bara og prátaðu um, at vit áttu at gjørt okkurt annarleiðis og nýtt, nú fastalávint var í hondum. Og so hildu vit eisini, at tað fór at vera heldur keðiligt, um flest øll bara komu í somu keyptu klæðunum. Tað er eisini nógv stuttligari hjá børnunum, tá tey sjálvi hava verið við til at gera síni egnu grýluklæði.

Konurnar í barnagarðsstovuni 'Látrinum' vóru ongantíð bangnar fyri, at verkætlanin skuldi ganga illa í hond , og fóru tær eisini undir arbeiðið í góðari tíð:

- Vit fóru í stundini oman á bókasavnið at lána bøkur við myndum av ymiskum grýluklæðum, síðan peikaðu børnini á tað, tey vildu vera. Men hóast vit hava nýtt bøkur, er tað tó fyri tað mesta hugflogið, ið hevur rátt. Eisini hava vit verið í Blákrossbúðini og keypt eina rúgvu av klæðum, ið vit síðan hava seymað um, uppí o. t. Men tá okkurt vantaði í, hava foreldrini verið sera hjálpsom og eru komin við ymiskum heimanífrá.

### Eingin grýla líka

Eingin í barnagarðsstovuni slapp at velja sær eins grýluklæði - t.v.s., at heili 20 búnar hava verið í gerð seinastu vikurnar. Men hóast hetta, hevur eingin klandur verið á stovuni. - Øll børnini vóru frálíka samd:

- Tað er nógv stuttligari at vera í heimagjørdum grýluklæðum, og so er eingin á stovuni heldur í somu klæðum, tekur ein lítil smádrongur til undir liðini á mær.

### Konurnar vælnøgdar

Konurnar í 'Látrinum' eru allar stak vælnøgdar við verkætlanina og halda í dag, at tað er stuttligt at síggja alt, ið er komið burturúr. Tær eru eisini einmæltar í, at arbeiðið ikki hevur verið til fánýtis og heldur ikki trupult at skipa:

- Serliga er tað stuttligt at síggja, hvussu glað og erpin børnini eru fyri klæðini. Tey hava í heilum spurt: 'Hvar eru míni klæði?' 'Nær verða tey liðug?' 'Kann eg sleppa í tey nú?' o.s.fr. Og onkuntíð hava vit lovað teimum at royna lidnu klæðini eina løtu. Vit hava eisini alla tíð havt nóg mikið av hugskotum og hjálpt hvørjari aðrari væl. Veðrið hevur um somu tíð verið gott seinastu vikurnar - vit hava verið nógv úti og spælt - og tískil hevur gott pláss verið inni til virksemið av grýluklæðunum.

### Stuttligt í barnagarði á fastalávint

Øll børnini í 'Látrinum' eru á einum máli um, at tað er óføra stuttligt at vera í barnagarði á fastalávint:

- Vit sleppa at vera í stuttligum klæðum, sláa tunnu, fáa bomm og fastalávintsbollar. Eisini kemur ein ristastórur pylsuvognur niðan í barnagarðin at geva okkum pylsur, breyð og kettjup. Men í kvøld verður tað somuleiðis stuttligt, tí tá fara vit øll út at ganga grýla millum húsini og fylla posarnar við bommi.



*Tá tunnan small í gólvið, kavaðu øll børnini um kapp eftir góðgætisposunum í komu úr tunnini*



*Hepni kattarkongurin Dánjal: - Eg eri so sterkur, sló so hart og tí gjørdist eg kattarkongur*